Fleiri rásir - einki roks

Á NRK leygarkvøldið kl. 19.55

# Mandela-konsert 46664 Arctic

Í annaðkvøld fara heimskendir tónleikarar á pallin í Tromsø, og NRK stendur fyri framleiðsluni av sendingini. Konserttiltakið í Tromsø, 46664 Arctic, er liður í herferðini ímóti herviligu virus-sjúkuni HIV/eyðkvæmi, sum Nelson Mandela síðst í 2002 tók stig til. Endamálið við hesum átakinum er at peika á tann alstóra vandan í HIV- og eyðkvæmissjúkuni. 46664 var fanganummarið, sum var sett á Nelson Mandela, tá hann í 18 ár sat fangið á Robben Island. Árið eftir, í 2003, varð fyrsta 46664-konsertin hildin í Cape Town í Suðurafrika. Nú savnast heimsstjørnurnar aftur á pallin, hesaferð í Tromsø. Fyrireikingarnar í Tromsø byrjaðu í fjør, men leingi var spurningur settur við dygdina á hesi konsertini. Fleiri røddir úr norsku fjølmiðlunum mettu, at nøvnini ikki vóru nóg kend og alt ov lítið lokkandi. Men fyri tveimum vikum síðan kunngjørdu fyrireikararnir, at Annie Lennox og Peter Gabriel komu at luttaka á konsertini. Somuleiðis vitjar Nelson Mandela Tromsø hetta vikuskiftið, og norska krúnprinsessan Mette Marit hevur eisini játtað at luttaka á konsertini. Sølan hevur gingið væl, roknað verður við, at konsertin verður útseld - tá eru uml. 15.000 atgongumerkir seld. Konsertin verður sjónvarpað í fleiri enn 50 londum.



*Annie Lennox, Peter Gabriel og Nelson Mandela vitja Tromsø hetta vikuskiftið*

## Tey luttakandi á konsertini:

- Peter Gabriel
- Annie Lennox
- Brian May
- Johnny Clegg
- Noora Noor, Tommy Tee og Stephen Simmonds
- Earth Affair
- Adjagas
- Madrugada
- Saybia
- Razorlight
- Robert Plant and the Strange Sensation
- Jivan Gasparyan
- Thomas Dybdahl
- Samsaya
- Madcon
- Zucchero
- Ane Brun
- Sharon Corr
- Angelique Kidjo
- Bongo Maffin
- Kaizers Orchestra
- Anneli Drecker

Á Kanal 5 sunnukvøldið kl. 23.00

# Brazil



*Tá gerandisdagurin gerst alt ov marrukendur droymir Sam Lowry (Jonathan Pryce) seg burtur. Í dreymunum er hann ein vøkur romantisk hetja við veingjum*

Sam Lowry er ein lítil syrgin embætismaður á kunningarmálaráðnum í einum marrukendum diktaturstati har eyga verður hildið við øllum borgarunum alt døgnið. Tá gerandisdagurin gerst alt ov marrukendur droymir Sam seg burtur. Í dreymunum er hann ein romantisk hetja við veingjum, sum í hvørjum dreymi bjargar eini dárandi vakrari dreymagentu. Men at liva undir einræðisstýri er framhaldandi torført. Øll stýrisskipanin í statinum verður stýrd av einari høvuðsteldu.

Ein dagin ger teldan eitt mistak, ið hevur við sær at óseki borgarin, Harry Buttle, verður avrættaður. Sam Lowry fær til uppgávu at hyggja nærri eftir málinum. Í hesum máli hittir hann ta vøkru Jill Layton, hendan er júst hon, ið hann hittir í dreymum hansara. Tað kemur fram, at Jill hevur samband við uppreistrarsinnaða blikksmiðinum, Harry Tuttle, ið av statinum er eftirlýstur fyri at gera svart arbeiði. Og tað var Tuttle, sum í veruleikanum skuldi avrættast, men teldan gjørdi jú eitt mistak. Brádliga er Sam partur av eini størri uppreistrarrørslu, og dreymur hansara, um at verða ein vøkur hetja, fánar alsamt, sum veruleikin ger um seg. Í staðin er hann nú - uttan at hann sjálvur vil tað - ein fíggindi av statinum, og eitt vakið eyga verður hildið við honum.

Við: Sam Lowry: Jonathan Pryce. Jill Layton: Kim Griest. Harry Tuttle: Robert De Niro. Jack Lint: Michael Palin. Spoor: Bob Hoskins. Warren: Ian Richardson. Eugene Helpman: Peter Vaughan. David Warner og Ida Lowry: Katherine Helmond.

Leikstjórn: Terry Gilliam.



*Terry Gilliam hevur leikstjórnað hesum sci-fi/skemtifilminum frá 1985*